# Á Fótatraðk

**(yrktur aftaná neiligan kritik av dansi felagsins í Ballerup anno 2004)**

**Lag: Veronica**

Á Fótatraðk, á Fótatraðk,
Hvar er títt góða stev?
Tit leika í á gólvinum,
so næstan skrædnar skrev.
Tað gamla er nú burtur,
eg sovni aldrin meir,
tá tit dansa.

Á Fótatraðk, á Fótatraðk,
tit vóru so fitt fólk,
so friðaliga dansaðu,
í ringi skonktu mjólk.
Nú er tað sterkur drammur,
tit hvølva í tykkara háls,
tá tit dansa

Á Fótatraðk, á Fótatraðk,
illa fóru tit.
Fyrr var tað so hugnaligt,
vit hoyrdu ei ein ”skid”.
Nú við sterkum røddum,
tit kvøða hátt í høll,
tá tit dansa

Á Fótatraðk, á Fótatraðk,
um teg eg felli tár.
Tit eru ung og óbúgvin
uttan rukkur og grátt hár,
við vøkrum ungum limum
tit taka saman ring
tá tit dansa.

Á Fótatraðk, á Fótatraðk,
tað pínir meg í barm,
tá tit við gleðis røddum
á gólvi halda larm
tit vísa at tit liva
og elska kvæðasið
tá tit dansa.

Á Fótatraðk, á Fótatraðk,
í minnum livi eg.
tit mintu meg á grøv,
svøvn og deyvatíðindi.
Nú minna tit um várið,
lív og gleim í lund,
tá tit dansa

Á Fótatraðk, á Fótatraðk,
Ei longur orki eg,
at sita vreið við penninum
og niðurgera teg.
Tí í gleðisrúsi,
tit eru nummar eitt
tá tit dansa.

**Sperilhølk - Dansifelagið Fótatraðk**

This document was created with Win2PDF available at http://www.win2pdf.com.
The unregistered version of Win2PDF is for evaluation or non-commercial use only.
This page will not be added after purchasing Win2PDF.